*Marknatrætan í óvissu:*

# Enn einki útspæl frá bretum



*Edmund Joensen, løgmaður hevði Sosialin á borðinum, tá vit vitjaðu hann herfyri. Tað eru greinarnar um bretska oljuídnaðin, sum leggur trýst á stjórnina at fáa loyst marknatrætuna og samanfallið millum upprunaliga bretska marknakravið og útpeikingina av áhugaverdum økjum við Føroyar, sum hava hans ara áhuga. Mynd Jens K Vang*

JAN MULLER

Fyri nyggjar uttalaði ein av limunum í bretsku samráðingarnevndini um markið, at bretar fóru at koma við einum nyggjum útspæli í marknatrætuni tíðliga í tí nyggja árinum.

Sum Sosialurin hevur skilt støðuna, so skuldi nyggja útspælið viðgerast og góðkennast av hægri myndugleikum tvs. ráðharranum, sum hevur málsøkið undir sær, áðrenn boð vórðu send føroyingum.

Nú fara vit skjótt inn í februar mánað og enn er einki útspæl komið. Árni Olafson, formaður í føroysku samráðingarnevndini sigur, at teir hava ikki frætt frá nakað itøkiligt frá bretum.

Hann vónar sjálvandi, at hetta at bretar hava brúkt so nógva tíð til hetta útspælið, merkir, at teir koma við onkrum góðum.

**Løgmaður tigandi**

Løgmaður hevur ikki hug at gera viðmerkingar til marknatrætuna í løtuni. Hann hevur heldur ongar viðmerkingar til greinina í Sosialinum fyri nyggjár, har víst varð á, at bretar møguliga hava vitað meira um føroysku undirgrundina, enn teir lótust, tá teir settu sítt uppunaliga krav fram um mark stutt suður úr Suðuroynni. Í tí greinini, sum løgmaður á myndini hevur liggjandi framman fyri sær á borðinum í Tinganesi varð víst á, at tað møguliga var eitt samanfall millum upprunaliga bretska marknakravið og so tey áhugaverdu økini, sum olju felogini herfyri peikaðu út við Føroyar.

*Árni Olafson, formaður í Oljuráðleggingarnevndini:*

# Góð tíð til at fyrireika okkum at greiða vandamál

*Leitingartíðin verður so mikið long, at tað verður tíð til at fyrireika seg væl og virðiliga, hvat skal henda, um tað sigur bingo sigur Árni Olafson, formaður í Oljuráðleggingarnevndini, nú røddir hava verið frammi, sum ávara móti avleiðingunum ein komandi oljuvinna kann hava á samfelagið. Hann vísir annars á, at tilmælið til myndugleikarnar til eina kolvetnislóg verður liðugt til várs*

JAN MULLER

Nú tað nærkast tíðini, tá Oljuráðleggingarnevndin skal lata landsstýrinum sítt tilmæli til eina kolvetnislóggávu gerast fundirnir hjá nevndini títtari. Nevndin hevur havt fund í Havn hesa vikuna.

Árni Olafson, formaður í nevndini, váttar, at tilmælið verður neyvan latið myndugleikunum fyrr enn í vár. Um hetta er í apríl, mei ella juni kann hann ikki siga.

Uppá fyrispurning um hetta kann merkja, at fyrsta útbjóðingarumfarið verður seinkað sigur hann, at tað er ilt at meta um.-Eg vóni tað besta.

Hann vónar í hvussu er, at tað fer at eydnast landsstýrinum at leggja málið fyri tingið á ólavsøku.

**Góð tíð til at umrøðavandamál**

Nú um dagarnar ávaraði búskaparfrøðingurin, Herman Oskarson í einum fyrilestri í Nóatúni móti avleiðingunum av eini oljuvinnu. Hann vísti m.a. á, at politiska skipan megnar als ikki at taka ímóti eini slíkari avbjóðing, at peningastreymurin inn til landið er heilt at avskepla samfelagið ostr.

Hvørja viðmerking hevur Árni Olafson, sum hesi seinastu árini hevur verið oddamaðurin í arbeiðinum at leggja lunnar undir eini komandi oljuvinnu, til slík úttalilsi'



*Árni Olafson, formaður í Oljuráðleggingarnevndini fer at handa løgmanni tilmælið til eina kolvetnislóg o.a. til várs.*

-Hatta eru so sjónarmiðini hjá einum privatmanni, sum eg ikki her skal gera viðmerkingar til.

*-Men sær tú fyri tær slík vandamál , sum hann her nevnir?*

Ja, men tey liggja so nøkur ár framman fyri tað, sum vit nú royna at arbeiða við, nevniliga at fáa leitingina í gongd. Eg rokni eisini við, at leitingartíðin verður nóg long til, at ein skal fáa tíð til at fyrireika seg væl og virðiliga til, hvat hendir, um tað sigur bingo.

Í løtuni ræður um at fáa grundarlagið lagt undir teimum avgerðum, sum tingmenn skulu taka eitt nú í sambandi við eitt fyrsta útbjóðingarumfar.

**Barna- og ungdómstelefonin**
hjá Barnabata/Reyða Krossi svarar mánadag frá kl. 16–18. Tlf. 10645.

**STRANDA BIO**
★ TLF: 48160 ★

Nýtt Dolby Sourround ljóðanlegg




Sunnudagin 26.1. kl. $21^{30}$
Mikudagin 29.1. kl. $19^{00}$
Friggjadagin 31.1. kl. $20^{30}$




Friggjadagin 24.1. kl. $20^{00}$
Sunnudagin 26.1. kl. $19^{00}$
Mikudagin 29.1. kl. $21^{30}$
Friggjadagin 31.1. kl. $23^{00}$




Friggjadagin 31.1. kl. $18^{00}$

**KOMANDI FILMAR**




03.02. Spritfire Grill
03.02. Brodrene McMullen
07.02. Kansas City

*Hugnalig cafeteria & gott ábit!*